*Uppgávan hjá Dátueftirlitinum er fyrisiting av persónsupplýsingarlógini.*

*Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingarmyndugleiki, sum vísir til Innlendismálaráðið.*

*Dátueftirlitið er skipað við ráði og avgreiðsluskrivstovu og hevur eftirlit við allari viðgerð, sum lógin um viðgerð av persónsupplýsingum fevnir um.*

*Dagliga virksemi hjá Dátueftirlitinum verður rókt av avgreiðsluskrivstovuni. Ráðið, sum landsstýrismaðurin setir, er skipað við formanni og 2 øðrum limum.*

*Eftirlitið hevur av sínum eintingum ella eftir klagu frá einum skrásettum eftirlit við, at øll viðgerð, sum lógin fevnir um bert fer fram í samsvari við lógina.*

*Av øðrum uppgávum kann nevnast vegleiðing og ráðgeving av almennum myndugleikum og privatum viðvíkjandi skáseting og víðarigeving av persónsupplýsingum, viðgerð av klagum og málum, sum ráðið av sínum eintingum hevur tikið upp, og viðgerð av fráboðanum og umsóknum um loyvir.*

*Dátueftirlitið hevur heimild til at gera kanningar á staðnum hjá almennum myndugleikum og hjá privatum.*

*Dátueftirlitið skal geva ummæli til ætlaða lóggávu, sum viðvíkur persónsupplýsingum og annars virka fyri góðum dátuviðgerðarsiði.*

## Fulltrúi til Dátueftirlitið

Við hesum verður søkt eftir fulltrúa til 3/4-tíðar starv til skrivstovuna hjá Dátueftirlitinum at byrja sum skjótast.

**Uppgávur**
Viðkomandi hevur dagligu leiðsluna og ábyrgdina av Dátueftirlitinum. Arbeiðsuppgávurnar eru fjøllbroyttar og fevna um málsviðgerð, vegleiðin og ráðgeving, fundarfyrireiking og luttøku á ráðsfundum, umframt kunnandi virksemi herundir dagføring av heimasíðu við kunnandi tilfari og gera ársfrágreiðing.

**Faklig førleikakrøv**
Krav er, at umsøkjarar hava viðkomandi útbúgving frá hægri lærusetri innan samfelagsvísindi so sum løgfrøði, útbúgving innan almenna fyrisiting ella líknandi útbúgving.

**Persónlig førleikakrøv og royndir**
Viðkomandi skal hava hug og evni at arbeiða sjálvstøðugt og evni skrivliga at málbera seg lýtaleyst á føroyskum. Kunnleiki til edv á vanligum brúkarastøði krevst.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Møguligir umsøkjarar kunnu seta seg í samband við Marionnu á Dul, fulltrúa á Dátueftirlitinum, tlf. 314763 fyri at hoyra meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, c.v. og møguligum viðmælum skulu sendast

Dátueftirlitinum
Tinganes
Postboks 64
FO-110 Tórshavn

og skulu vera Dátueftirlitinum í hendi í seinasta lagi 25. januar 2005

Skilling í Miðbýnum og í SMS

ÚTSØLA



MÁNADAGIN 17. JANUAR

**Ókeypis stell**
við keyp av gløsum

Frátikin stell **-50%**
Onnur stell **-15%**
Kikarar **-20%**

SKILLING
N. Finsens gøta 23 · Tel 312225 · Fax 310525 / SMS · Tel 315656

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Tórshavnar Ellis- og umlættingarheim**

Á Tórshavnar Ellisheimi búgva 25 búfólk og á Umlættingarheiminum eru 8 umlættingarpláss

Tórshavnar Ellis- og umlættingarheim er kommunalur stovnur undir trivnaðarfyrisitinginí við rakstrarjáttan frá Almannamálaráðnum sambært játtan á fíggjarløgtingslógini.

## Starvsfólk til Tórshavnar Ellis- og umlættingarheim

Á Ellis- og umlættingarheiminum eru hesi størv leys at søkja:

Eitt fyribils starv sum heilsurøktari á starvsbrøki 0,7 í skiftandi vaktum at seta sum skjótast og fram til 31. desember 2005.

Eitt starv sum heilsurøktari á starvsbrøki 0,75 í skiftandi vaktum at seta skjótast tilber.

**Vit bjóða**
- eitt avbjóðandi starv sum umfatar allar tættir innan eldrarøkt. Vit eru í fer við at umleggja arbeiðsgongdina, soleiðis at vit nærkast tillutaða røkt. Umframt røktaruppgávur fer uppgávan eisini at snúgva seg um bólkaleiðarafunktiónir og vegleiðing av starvsfólkum og praktikkvegleiðing av næmingum.
- eitt starv har Ellisheimið er arbeiðsstaður, tó við møguligum vaktum á Umlættingarheiminum.

**Vit sóknast eftir heilsurøktarum sum**
- hava hug og hegni at arbeiða innan geriatriina
- eru fleksiblir og positivir fyri broytingum og hava góð samstarvsevni
- hava hug og hegni at átaka sær vegleiðingsuppgávur

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir smb. sáttmála millum Almanna & Heilsurøktarafelagið og Fíggjarmálaráðið.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Idu Sørensen, leiðara á tlf. 317339 ella 311839.

**Umsókn**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Ellis– og umlættingarheiminum, att. Ida Sørensen, V. U. Hammershaimbsgøta 7, FO-100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. januar 2005.

- onnur leys størv?
Hygg á
www.torshavn.fo

**FRÁ D.B.BILUM**

**5 stk. HYOSUNG ATV all terrain vehicle til serprís**



2 stk. HYOSUNG ATV 90 CC
· reyð og svørt
· vanl. prísur kr. 18.000,-

Sertilboð, nú bert
**15.900,-**



3 stk. HYOSUNG ATV 50 CC
· gul og blá
· vanl. prísur kr. 16.750,-

Sertilboð, nú bert
**14.750,-**

Sosialurin 341800

D. B. Bilar
J. Bronckgøta 15 · FO-110 Tórshavn
Tel 310 600 · www.dbbilar.fo